# Gjestal Orkide - Superwash Sport

## Barnajakkar

**BARNEJAKKE**

| **Størrelser:** | | **1** | **2** | **4** | **6** | **8** | **10** | **12** | **år** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** (plaggets mål) | ca | 64 | 69 | 76 | 82 | 88 | 93 | 100 | cm |
| **Hel lengde:** | ca | 31 | 36 | 41 | 46 | 50 | 54 | 58 | cm |
| **Ermelengde:** | ca | 21 | 26 | 30 | 33 | 36 | 39 | 42 | cm |

**MATERIALER: Gjestal Orkide (100% polyester), nøster à 50 g.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| korallrødt nr. 646 eller lyse gult nr. 616 = farge 1 | ca. | 3 | 4 | 4 | 5 | 5 | 6 | 7 nøster |
| sjokkrosa nr. 607 eller okergult nr. 604 = farge 2 | ca. | 2 | 2 | 3 | 3 | 4 | 4 | 5 nøster |

5-5-6-6-6-7-7 knapper.

**Pinner:** Rette p nr. 4 og 4½ eller 5 (eventuelt rundp).

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram.

**Strikkefasthet:** 18 m glattstrikk i bredden med Orkide på p nr. 4½ eller 5 måler 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**JAKKE**

**Bolen** (str frem og tilbake)
Legg opp 122-130-142-154-164-174-186 m på rette p nr. 4 med **farge 1** og str 6 riller (12 p r frem og tilbake). Str inn ett knapphull i høyre side fra retten etter 3 riller. Hvert knapphull lages ved å felle av 2 m, 2 m innenfor forkanten. Det legges opp 2 nye m rett over de felte m på neste p. Skift til p nr. 4½ eller 5 og glattstr, men med 6 m langs begge forkantene som str i rillestr (alle p r). Det str inn ett knapphull ca. hver 5. cm i høyre stolpe. Sett en merketråd i hver side med 58-62-68-74-78-84-90 m til ryggen og 32-34-37-40-43-45-48 m til hvert forstykke. Str rett opp til arb måler ca. 18-21-24-27-30-33-36 cm. Fell 8 m i hver side til ermehull (med 4 m på hver side av merketråden). Legg arb til side og str ermene.

**Ermene**
Legg opp 36-38-40-42-44-46-48 m på p nr. 4 med **farge 2** og str rillekant som nede på bolen. Skift til p nr. 4½ eller 5 og glattstr. Øk videre 1 m i hver side innenfor den ytterste m på hver 3. p for 1 år - på hver 4. p for 2 år- vekselvis på hver 4. og 5. p for 4 år - og på hver 5. p for de øvrige størrelser til det i alt er 58-60-64-68-72-76-80 m på p og arb måler ca. 20-25-29-32-35-38-41 cm - eller til ønsket lengde. Fell 4 m i hver side og str det andre ermet likt.
Sett så alle delene inn på samme p (rundp) nr. 4½ eller 5 (= 206-218-238-258-276-294-314 m). Fortsett med **farge 1** videre frem og tilbake i glattstr og **fell til raglan i alle 4 sammenføyningene** fra rettsiden slik: Sett et merke i alle 4 sammenføyningene. Str til 2 m før merket, str 2 m r sm, ta 1 m løs av, str 1 r, trekk den løse m over. **Samtidig** når arb måler ca. 27-32-37-42-46-50-54 cm felles de 3 ytterste stolpem rett av. Sett videre av m på en maskeholder i hver side på hver 2. p til halsringningen med 3 stolpem + 2-3-4-5-6-7-8 m (for de forskjellige størrelser), deretter 3,2,1 m (likt for alle størrelser). Det felles samtidig til raglan som før til det i alt er felt 15-16-18-20-22-23-25 ganger (til alle m på forstykket er felt).

**Krave og montering**
Sett m fra rygg og forstykker rundt halsen samt m fra maskeholderene inn på p nr. 4 og fell jevnt fordelt til 64-66-68-70-72-76-78 m innenfor stolpem. Str 2 cm frem og tilbake med **farge 2** i vrangbordstr med 1 r, 1 vr. Skift til p nr. 4½ eller 5 og str videre i glattstr og med 3 m i hver side i rillestr. Øk 1 m i hver side innenfor de 3 rillem på hver 2. p. Str til kraven måler ca. 7-8-9-10-11-12-12 cm, str 6 p rillestr. Fell av til en pen, jevn kant som ikke strammer. Sy ermene sm og sy sm under ermene. Sy rundt knapphullene og sy i knapper.
Fest alle løse tråder pent på vrangen.




**LUE** (2 størrelser)
**MATERIALER: Gjestal Orkide (100% polyester), nøster à 50 g.**
**Gjestal Superwash Sport (100% superwash ull), nøster à 50 g.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Orkide:** korallrødt nr. 646 eller gult nr. 616 | ca. | 2 | nøster |
| **Superwash Sport:** okergult nr. 218 | ca. | 1 | nøste |

**Pinner:** Strømpep nr. 3½ og 4½ eller 5 (eventuelt rundp).

**Strikkefasthet:** Som jakke.

Legg opp 68-72 m med **Orkide** på p nr. 3½ og str 4-5 cm rundt i vrangbordstr med 2 r, 2 vr. Skift til p nr. 4½ eller 5 og str videre i glattstr. Str rett opp til arb måler ca. 18-20 cm - eller til ønsket lenge. Fell av til en pen, jevn kant som ikke strammer. Sy eller mask luen sm på toppen. Lag to små pomponger av Superwash Sport og sett en i hvert hjørne ytterst i toppen på luen.

***Press ikke arb.***

**Uppskriftin hesa vikuna**

Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46



**VIÐMERKINGAR**

# Sambandspolitikkur hjá loysingarsamgonguni er orsøkin til framgongd hjá Fólkaflokkinum



**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*

Um fullveldissamráðingarnar hildu fram hevði Sambandsflokkurin uttan iva fingið eini 35% av atkvøðunum (varisliga mett), men fullveldið er farið til botns. Sjálvstýrisflokkurin tað sama. Niðurtúrurin hjá Fólkaflokkinum er vorðin til framgongd, tí fullveldið er sokkið.

Loysingarsamgongan hevur í verki ført Sambandspolitikk – vánaligan fyri tað mesta. Um loysingarpolitikkur varð førdur alt samgonguskeiðið, so hevði Fólkaflokkurin helst ligið um tey 3% ini. Tí tá hevði arbeiðsloysi longu nú eftir 3 árum verið stórt. Nógvar uppsagnir høvdu verið í serliga almenna sektorinum og avleiddum vinnum frá hesum. Fólkafráflyting og tvingsilssølur høvdu verið høvuðsreglan og ikki undantakið.

Vánaliga og jánkasliga støða løgmans ( Um ongin støða eisini er ein støða) heldur lív í Tjóðveldisflokkinum. Tað tykist sum hann er bangin fyri hesum flokki.

Eftir at Fólkaflokkurin slepti Fullveldinum – og samstundis fór at tosa um skattalætta – sum ongin, tíverri, hevur sæð nakað til enn – er aftur farið at bragda hjá teimum, sambært seinastu veljarakanningum.

Veljarin hevur við hesum kanningum víst, at tey vilja
• ikki hava loysing
• tey vilja hava skattalætta.

Sambært samansetingini í Løgtinginum í løtuni er greitt, at allir flokkar vilja hava ríkisrættarligar broytingar. Ein sera stórur meiriluti av øllum føroyingum vil hava hesar broytingar – innan Ríkisfelagsskapin.

Nevniliga veljarin hjá Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og hjá Fólkaflokkinum.

Um Fólkaflokkurin hevði hildið fast við upprunaligu fullveldisskandaluna, so hevði hann helst fingið minni enn 5% av atkvøðunum og nærkast Sjálvstýrisflokkinum. Tað er nevniliga púra greitt, at eftir seinasta samráðingarkollaps har fullveldið fór til botns, fór at gangast betri hjá samgonguni (undantikið Sjálvstýrisflokkinum, ið er í sorli, tí hann er ov kvettingarsinnaður). Á ein hátt sera marghháttligt at tað fór at gangast betri hjá hesi samgongu tá høvuðsendamálið, fullveldið, fór í knús.

*Loysing er skattahækking:*
• Fólk vilja hava skattalætta
• Tey vilja hava góð útbúgvingartilboð fyri teirra børn
• Eina góða sosiala skipan.
• Eitt gott vinnulív
• Hesi ynskir torpederar loysingin totalt.
• Tí sigur ein stórur meiriluti av føroyingum NEI TIL LOYSING. Loysingin er ein andsøgn til góð viðurskiftir á nevndu økjum. Tá loysingarsamgongan hevur bøtt um hesi viðurskiftir – so hevur hon ført Sambandspolitikk – ikki loysingarpolitikk. Í løtuni liggur loysingarpolitikkurin í toku og ongin veit hvat samgongan vil. Tað kunna tey ikki vita, tí samgonga veit tað ikki sjálv!

*Skattalætti:*
Veljarin vil hava ein hart tiltrongdan skattalætta, ið eisini eigur at lækka 37% markið, so fólk, ið arbeiða, hava meira eftir.

Sum er í dag, merkja flestu fólk hvussu arbeiði verður straffað í okkara samfelagi. Tí eigur allur skattastigi okkara at verða lækkaður.

Lat meg í somu atløgu nevna, at fakfelagsrætturin og frælsið skal varðveitast, soleiðis at ein skattalætti ikki skal viðføra lógarásettar skerjingar av lønum. Tí lønirnar eru ein samráðingarspurningur á arbeiðsmarknaðinum og eigur at verða tað framyvir. Fakfeløgini eiga og skulu taka sær av hesum.

*Hvat eigur at verða gjørt:*
Føroyar hava ligið bak seinastu 3 árini. Fullveldisørskapurin hevur oyðilagt mangan skilagóðan politikk. Hóast tað gongur væl fíggjarliga orsaka av góðum fiskaprísum og ríkisveitingini, so hava vit hægsta nettoskatt í heiminum – og hendan samgongan hevur bert hækka teir meira.

*Ríkisveitingin ikki skerjast:*
Nú eiga stóru flokkarnir á tingi at gera eina semju um ríkisrættarligar broytingar innan Ríkisfelagsskapin. Ríkisveitingin eigur ikki at skerjast í fyrstu atløgu, tí tað eru so mong viðurskiftir, ið liggja í órøkt. Og tað skal nógvur peningur til at fáa rætta upp uppá nógv av hesum álvarsøkjum.

Um Tjóðveldisflokkurin ikki sleppir loysingini, ja, so eigur hann at fáa durafjórðingin. Fólkaflokkurin eigur ikki at ræðast Tjóðveldisflokkin, tí ræðslan, ið serliga løgmaður hevur, heldur lív í hesum Harakiripilotum.

Vit áttu nú at framt
• broytingar innan ríkisfelagsskapin
• skattalætta fyri allar inntøkur.
• Bygt Føroyar uppaftur.

Tað átti at verið ein meiriluti fyri hesum politikki á Føroya Løgtingi. Løgmaður eigur, eftir míni hugsan at hugsa um Føroyar og vælferðina, og tí skipa eina breiða samgongu við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin.

Tað hevði verið í tráð við ein sera stóran meiriluta i Fólkaflokkinum. Tað vísir nevniliga seinasta veljarakanning.

*Fullveldisbrotsverki bert eydnast tí Sambandspolitikkur er rikin í verki:*
Fullveldisætlanin hevur alla tíðina verið eitt brotsverk ímóti Føroyum. Hesin glæntrileikur hevur bert gingið, tí loysingarsamgongan í verki hevur ført ekspansivan Sambandspolitikk. Um loysingarpolitikkur varð framdur høvdu skerjingar verið á øllum økjum og serliga í Tórshavn har almenni sektorurin er størst. Og skattahækkingarnar øðiligar.

Um Tjóðveldið og Fólkaflokkurin høvdu havt framgongd um neyðugar loysingar skerjingar, uppsagnir og skattahækkingar vórðu framdar seinastu 3 árini við útliti til somu OYÐIMARKARGONGD komandi 20 árini, fer ein at ivast í. (Tá høvdu einstakir rithøvundar uttan iva havt tilfar nokk at skriva um í einum kreppuraktum Føroyum). Men framgongd tá teir fremja Sambandsflokspolitikk, stórt sæð, tað vísir, at vit í Sambandinum eru á rættari kós.

*Nýskipanaruppskotið neyðugt:*
Á ríkisrættarliga økinum er nú neyðugt at taka undir við komplettum Sambandspolitikki og seta í verk Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins.

Tað er nevniliga trygt fyri allar føroyingar og Føroyar.

Tað kunnu vit liva við – øll.

Vit siga nei til at høvuðsrættur okkara verður tarabløð.

# Mannarættindi –Kvinnurættindi

**Súsanna Dam**



Eg var sera fegin at lesa leiðaran í Sosialinum ídag 6. des. 2000 Endiliga hevur ein miðil tikið seg saman til á ein sámuligan hátt, at gera vart við, hvussu álvarsligar fylgjur tað hevur fyri samfelagið, at alt ov fáar kvinnur eru við til at mynda menningina og taka avgerðir.

Spurningurin er hvussu væl fólkaræðið virkar, ella um tað í heila takið kann virka i einum samfelag, sum er so totalt mansdomineráð, eins og Føroyar eru.

Men hvussu kunnu vit vænta at kvinnur skulu vera roknaðar sum skilvísar verur, tá vit dag um dag lata ein stovn sum Útvarp Føroya hóreiggja sær, sum teir gera. Skráin er at vísa seg gjørd av monnum um menn, til menn at lurta eftir. ÚF kundi fyri tað havt yvirtikið skipanina hjá gomlu spartanarnum. Púra rætt, húsfaðirin er eisini hann, ið fær rokningina fyri útvarpsgjaldið.

Í morgum tosaði útvarpið við eina listakvinnu, sum í hesum døgum vísir fram list sína í New York, men útvarpsmaðurin lýsti hana sum frú Tordur Niclasen!!!

So kemur næsta sending, Jógvan Arge lesur 16 part av tí sera kvinnudiskriminerandi Tættir úr Kirkjubøar Søgu. Endursending minst einaferð afturat, um ikki øll skuldu havt fingið við, hvussu lítið virdar kvinnurnar í Kirkjubø vóru.

Fríggjakvøld og leygarkvøld í ÚF eru rein mannfólkadyrkan, so at tú nærum ivast í um prátið er heilt normalt. Hvussu sjúkt tað er, hoyrdist seinasta vikuskifti tá einhvør úrmælingur – male sjálvsagt – frambar sínar genialu hugleiðingar um kvinnuligar bilførarar. Ein hugleiðing, sum útvarpsverturin frammanundan hevði lýst viðkomandi og beinrakna at vera.

Og hvør minnist ikki blondinusøgurnar sum plágaðu okkum hvønn einasta seinnapart eitt heilt summar.

Okkurt skilafólk mátti starvast í útvarpinum, kundu vit ikki hjálpt teimum at skumpa ítróttarbýttlingarnar ella onnur líka fjantut og týdningarleys mannfólk burtur, so tey í staðin fyri kundu farið at nýtt ÚF til at lýsa veruliga heimin og teir spurningar, sum snúgva seg um dagligu tilveruna hjá okkum øllum.

Vit mugu í hvussu so vera greið yvir, at her restar nógv í, at kvinnur fáa sín sjálvsagda lut í øllum lívsins viðurskiftum, og tí er tað eitt virðismikið stig, at Sosialurin tekur henda spurningin upp á leiðarastøði.

# Ein kettling í jólagávu? Nei takk

**Jonna Justinussen**

Nú tað er jólagávutíð, so er tað tíð til at minna fólk á, at tað er eitt ómetaliga ringt hugskot at geva livandi dýr í jólagávu. Hvørki ein ella tveir kettlingar (ella fimm, sum fólk, ið hava kettufarm bjóða framm í lýsingunum) ella ein hundahvølp.

Avgerðin um at fáa sær eina kettu ella hund, skal ikki takast av øðrum. Tað er nakað tú gert, tá tú hevur hugsað teg gjølla um, tí tað fylgir nógv arbeiði við. Hetta er eitt arbeiði, sum summi gera við gleði, og onnur ikki kunnu fordraga. Hesi seinastu eiga sjálvandi ikki at hava kelidýr.

Tað er eisini tíð hjá mær at fortelja søguna um ein lítlan fittan kettling, sum ikki er til meira. Hann kom tíverri ikki til tey røttu fólkini.

Familjan fekk hann í desember mánaða. Kanska var hann jólagáva, eg veit tað ikki. Men hann, kettlingurin, vísti seg at vera ein ketta, og hendan lítla kettan (lítil, tí hon var ikki heilt vaksin) fekk kettlingar í august mánaða, tvs. 8 mðr. gomul. Kettlingarnir blivu avlívaðir, men fólk gloymdu at geva mammuni, tí lítlu kettuni, p-pillarar, so hon gjørdist upp á vegin beinanvegin. Har gekk ein vilstur, heimleysur frensur í grannalagnum. Tað var ivaleyst hann, sum voldtók tað lítlu kettuna. Hann hevði ikki havt áhuga fyri henni, um hon hevði fingið p-pillarar, og so var onki hent.

Familjan tímdi ikki at hava stríðið, ongin var heima um dagarnar, og kettan gekk úti allan dagin. Ongin hurð var á gloppi og ongin lúka, so hon kundi fara inn, og tí royndi hon at sleppa sær upp í onkran heitan barnavogn.

Ja, og hvat halda tit so, var endin á hesum »lítla fitta kettlingi«?